SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Fyrst og fremst, so høvdu vit nógv meira at spæla fyri*

*Jákup á Borg, HB*

# Kramer-Mikkelksen skal selja Fremad Amager

**Fyrrverandi borgarstjórin í Keypmannahavn og núverandi Ørestad-stjórin, Jens Kramer Mikkelsen, verður gestarøðari, tá Fremad Amager í heyst hevur tiltak fyri føroysku sponsorum sínum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fremad Amager er spakuliga farið í holt við at selja sponsor-pakkar í Føroyum. Og stórur dentur er lagdur á, at geva føroysku stuðlunum nakað aftur fyri peningin.

Fyri upphæddir millum 12.500 og 150.000 kr. er Fremad Amager farið í holt við at selja sonevnda Team Føroyar Business Club. Hetta er liður í miðvísa arbeiðinum at styrkja fíggjarliga grundarlagið undir felagnum, ið eisini í ávísan mun skal virka sum klekingardepil fyri føroyskar spælarar.

Hóast upphæddirnar kunnu tykjast stórur fyri summi, so er stórur dentur lagdur á, at fyritøkurnar, sum gerast partur av hesum, eisini fáa valuta fyri gjaldið. Bæði í profileringini, sum sjálvsagt er í einum sponsorati, men eisini við at hava serstøk tiltøk.

Størsta tiltakið í so máta verður í Føroyum í heyst, har fyrrverandi borgarstjórin í Keypmannahavn, Jens Kramer Mikkelsen, verður gestarøðari.

Í aðrar mátar er sjálvandi munur á innihaldinum í pakkunum. Minstu pakkarnir innihalda tvey atgongumerki – íroknað flogferð – til dystir hjá Fremad Amager, tvey atgongumerki til tiltakið í havn, umrøðu á internettilfari og hovi at hitta vinnulívsfólk í danska business club hjá Fremad Amager. Stóri pakkin, sum verður nevndur Platin, inniheldur bandalýsingar, lýsingar í leikskrá, lýsingar í donskum og føroyskum miðlum og dystarsponsorat, umframt at atgongumerkini til dystir og tiltakið tá eru 10 í tali.

Sum skilst, so er gongd spakuliga komin á søluarbeiðið, og fleiri fyritøkur hava longu sýnt sponsorpakkunum stóran áhuga.



*Fyrrverandi borgarstjórin í Keypmannahavn, Jens Kramer Mikkelsen, verður gestarøðari á kvøldinum, sum verður fyriskipað fyri føroyska business-club hjá Fremad Amager*

*Mynd: Polfoto*

## Formula-liðið

**Sosialurin mannar Formula-liðið við teimum spælarum, sum stóðu seg besti í 9. umfarinum av Formula-kappingini**




## Símun skoraði sigursmálið

**Keflavík vann í gjárkvøldið 2-1 í fyrsta umfari í hesum kappingarárinum, tá ið teir spældu á útivølli ímóti KR**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Einasti føroyski spælarin í íslendskum fótbólti, Símun Samuelsen, var í brennideplinum, tá Keflavík mánakvøldið spældi fyrsta landskappingardystin í ár.

Símun var á vøllinum til tað restaðu tveir minuttir, tá ið Keflavík spældi á útivølli í vesturbýnum í Reykjavík ímóti KR.

Úrslitið var 2-1 til Keflavík. Símun Samuelsen skoraði í 62. minutti seinna málið hjá Keflavík. Hann økti til 2-0, eftir at Keflavík seks minuttir undan steðginum hevði skorað fyrsta málið við brotssparki.

Símun var á miðvøllinum í vinstru. Málið skoraði hann eftir innlegg úr høgru.

Sjey minuttir undan leikloki minkaði KR um munin. Tað eydnaðist kortini Keflavík at halda tørn og at fara til hús við øllum stigunum. Hini úrslitini í fyrsta umfari: ÍA-FH 2-3, Valur-Fram 1-1, Breiðablik-Fylkir 0-1, Víkingur-HK 0-0 og KR-Keflavík 1-2.

Sunnudagin skal Keflavík spæla á heimavølli ímóti FH, sum seinastu árini hevur verið stinnasta felagið í Íslandi.